# Real good

**Røddirnar hjá The Real Group kunnu sanniliga nógv. Eitt ógvuliga fyrimyndarligt og alt í alt gott kvøld átti The Real Group at bjóða føroysku fjøldini**

UMMÆLI
*Heri á Rógvi*

Var hetta ein ítróttargrein, vildi yvirskriftin ljóða á einari leið sum »Tey gjørdu sína skyldu«. Á pallinum í Norðurlandahúsinum fyri einum stúgvandi fullum sali stóðu fimm svenskir sangarar. Fimm topp-professionellir sangarar, ið gjørdu sína skyldu við einari fyrmyndarligari framførslu.

Føroysku áhoyrarafjøldin eitt týskvøld í august var til at temja hjá teimum fimm sangurunum úr Svøríki.

Eitt av stóru nøvnum á ársins Listastevnu Egberto Gismonti kundi skoða fleiri tómar stólar í salinum, tí leveraði vøruna leygarkvøldið. Tey fimm í Real Group sóu ein stóran sal í Norðurlandahúsinum frá sínari allarbestu síðu.

Hetta við A Capella er rættiliga forkunnugt í Føroyum. Tí er tað heldur ikki so galið, at tá tað so er á palli í Føroyum, so er talan um ein so víðagitnan bólk sum The Real Group.

Tað er heldur ikki at koma uttan um, at talan er um sangdygdir av ovastu rók, tá tosað verður The Real Group. Ein harmonisk eind við tættum og dygdum fremjandi eina størri uppliving við máttunum í røddunum.

Við einari skrá við mest egnum sangum bjóðar The Real Group eina ógvuliga gjøgnumførda og trygga framførslu. Allatíðina í kontrol yvir støðuni og egnum røddum. Tað var ein sovorðin elegant balansa, sum merkti framførsluna týskvøldið. Leikandi runt á pallinum er einki at taka seg aftur í, at tær yvir 1.200 framførslu hava skapt eina rutinu, sum tey njóta gott av.

Alt var skipað og einki tilvildarligt. Syngjandi inn frá byrjan og beinanvegin ígongd. Sjálvt teirra máti at bukka fyri áhoyrarunum var innstuderaður. Fyrsta lagið skuldi eisini lata fjøldina vita, hvørjar dygdir búgva í røddunum á teimum fimm.

Sangirnir vóru flestir teirra egnum – bæði á enskum og svenskum máli. Tað, tey ikki áttu sjálvi, var, við tveimum undantøkum, eisini á svenskum. Sangirnir vóru rættiliga jazz merktir, men í seinnu helt av framførsluni gjørdist tað alsamt meira frítt við tónleikasløgunum. Uppskriftin til eina góða framførslu liggur í at fáa áhoyrararnar við, og tað gjørdu tey so sanniliga eisini. Improvisatiónsløtan var ein fragd fyri øll av og á palli, har áskoðararnir sluppu at velja sangir og alternativ tónleikasløg til sangirnar.

Tekstirnir á teirra egnum løgum taka støði í nútíðar gerandisdegnum, og innihaldsliga eru teir so sum so.

Tað stendur tó eftir sum eitt upplivilsi, at teirra røddir eru nakað sum tikið úr einum øðrum heimi í løtuni týskvøldið. Hvør betri enn annar. Skalt tú rósa einum, so mást tú rósa øllum.

Hvat segði so fjøldin? Ein áhoyrarafjøld hevur sjáldan klappað so ofta og leingi sum tann týskvøldið. Við røttum broddi við rósandi orðum um oyggjarnar og eykasangum slag í slag tók rómurin mestsum ongan enda, og sølan av fløgum hevur neyvan sæð sín líka, sum tann eftir konsertina.

Tað krevur nógv arbeiði at náða tindarnar, men tað eru nøkur, ið duga. Teirra millum er The Real Group. Meira enn nakað annað ógvuliga gott.



*The Real Group byrjaði at syngja í 1984. Teir væl skúlaðu sangararnir í bólkinum hava við øllum sínum royndum skapt ein tann mest harmoniska bólkin, ið tú kemur at hoyra við einans at nýta sínar røddir.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

## FAKTA

**Sangarar:** Margareta Jalkeús, Katarina Stenström, Anders Edenroth, Peder Karlsson og Anders Jalkéus

**Bólkurin stovnaður:** 1984

**Útgávur:** 11 - Stämning (2002), Allt det bästa (2001), Commonly Unique (2000), One for all (1998), En riktig jul (1997), Jazz:Live (1997), Ori:ginal (1996), Varför får man inte bara vara som man är (1994), Röster (1991), Nothing but the Real Group(1989), Debut (1987)




# Bilar

Nr. 154 • hósdagur • 15. august 2002 • 76. árg.



*Nýggja Golf-røðin byrjar við hesum mini-MPV, ið kemur á marknaðin seinni í ár. Bilurin verður bæði til 5 og 7 persónar*

# VW Golf MPV seinni í ár

**Ein nýggjur VW Golf MPV kemur á marknaðin seinni í ár. Bilurin skal kappast við bilar sum t.d. Opel Zafira og Renault Scénic**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nú er tað onki loyndarmál, at VW í longri tíð hava arbeitt við einum Golf MPV. Nýggja Golf-røðin, ið er á veg, byrjar við einum MPV, sum kemur á marknaðin seinni í ár. Bilurin verður, eins og fleiri aðrir í hesum klassanum, bæði til 5 og 7 persónar. Næsta ár kemur eisini ein heilt nýggjur Golf hatchback, ið verður nakað størri enn forgangarin.

# Ung í Danmark
# - halda seg vera vandamikil í ferðsluni



*FDM kanningin vísir, at 59 prosent av teimum ungu millum 15 og 29 ár í Danmark halda seg vera vandamiklari bilførarar enn onnur*

**Í fyrraárið doyðu 73 ung í aldrinum millum 15 og 24 ár í ferðsluni í Danmark, antin sum bilførarar ella ferðandi í einum bili. Næstan 60 prosent av teimum ungu meina sjálvi, at tey eru vandamiklari bilførarar enn onnur í ferðsluni. Hetta vísir ein kanning, sum FDM nýliga hevur latið gjørt**

UNG Í FERÐSLUNI
*Magnus Gunnarsson*

Tey ungu eru klár yvir, hvussu vandamikið tað er fyri tey at koyra bil. 73 deyð, 581 fingu álvarsligan skaða og 831 fingu smærri snuddir. Hetta eru tey døpru tølini fyri tey ungu millum 15 og 24 ár, sum vóru við í ferðsluvanlukkum í 2000. »Tað er meiningsleyst og syrgiligt, at so nógv ung doyggja í bili í Danmark. Høvdu tey bara vilja ásanna teirra manglandi royndir, brúkt trygdarbeltir og lætt fótin av spitaranum, kundu nógv ung lív verði spard«, sigur løgfrøðiligi stjórin hjá FDM, Lars Ellegaard.

## Halda tey eru ódeyðilig

Hóast tey ungu ásanna teirra tørvandi royndir í ferðsluni, doyggja nógv fleiri ung undir 25 ár í ferðsluni enn í øðrum aldursbólkum. FDM hevur latið gjørt eina kanning av, hvat tey ungu millum 15 og 29 ár halda um seg sjálvi og bilkoyring. Kanningin vísti at 59 prosent í hesum aldursbólkinum, hildu at tey vóru vandamiklari bilførarar enn onnur. Tað kunnu vera nógvar orsøkir til at ung fólk eru til so stóran vanda í ferðsluni. Sálarfrøðingar vísa á ungdómligt stórlæti og ov stórt sjálvsálit, at tey nærmast halda, at tey eru ódeyðilig, saman við tørvandi fatan av at teirra gerðir fáa avleiðingar. Hetta er ein vandamikil og hættisligur blandingur. Tey ungu hava kanska refleksini í ordan, men mangla tær neyðugu royndirnar í at koyra ein bil við nógvari ferð undir torførum umstøðum.

*Kelda: FDM / Motor*